# FM kapping í Vági

**Nú verður farið undir FM-kappingina í bridge, og fyrsta kappingin í vetur verður í Vági**

BRIDGE
*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*

Tann fyrsta FM kappingin í kappingarárinum 2002-03 verður suðuri í Vági komandi vikuskifti. Kappingin er FM fyri feløg, har feløgini senda hvør sítt lið at dystast móti hvør øðrum. Seks feløg hava boðað frá luttøku. Havnar Bridgefelag, Nýggja Bridgefelag, Bridgedeild Kaggans, Eysturoyar Bridgefelag, Tvøroyrar Bridgefelag, og so vertirnir við sínum nýggja felag, ið nú eitur Vágs Bridge- og Billiardfelag.

Spælt verður í hølunum hjá Vágs Bridge- og Billiardfelag, og kappingin byrjar fríggjakvøldið kl 22.00, tá tað fyrsta av 5 umførum a 20 spøl verður spælt. Leygarmorgunin kl. 10.00 heldur kappingin fram, og hon endar leygarkvøldið umleið klokkan 22.

Í fjør var kappingin spæld vesturi í Vágunum, og tá vann Bridgedeild Kaggans. Spælt verður um eitt ferðasteyp.

**Vinnarar FM fyri feløg:**

| | |
|---|---|
| 2002-03: | ? |
| 2001-02: | Bridgedeild Kaggans |
| 2000-01: | Havnar Bridgefelag |
| 1999-00: | Bridgedeild Kaggans |
| 1998-99: | Eysturoyar Bridgefelag |
| 1997-98: | Eysturoyar Bridgefelag |
| 1996-97: | Nýggja Bridgefelag |
| 1995-96: | Vestmanna Bridgefelag |

# Pass er gott!

Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen, spøl frá EM

Pass er eitt nógv undirmett meld í bridge. Í hesum spælinum ímóti Grikkalandi (11-19) stóðu Hans Jacob og Arnbjørn seg væl við bara at melda pass!

| | | |
|---|---|---|
| NR. | 76543 | |
| N/A | 1042 | |
| | J10953 | |
| | - | |
| Q109 | | AK82 |
| AQ5 | | K8763 |
| K4 | | Q62 |
| AQ1042 | | J |
| | J | |
| | J9 | |
| | A87 | |
| | K987653 | |

| S | V | N | E |
|---|---|---|---|
| Arnbjørn Sivertsen | Aristidis Sapounakis | Hans J Petersen | Emmanouil Chadzidakis |
| - | - | pass | 1hj |
| pass | 2kl | pass | 2ru |
| pass | 2sp | pass | 2ut |
| pass | 3hj | pass | 4hj |
| pass | 4ut | pass | 5hj |
| pass | 6hj | pass | pass |
| pass | | | |

Sunnan kann verða freistaður at melda inn ella sperra í kleyvara, men tað er litgóðskan alt ov vánalig til, og hetta hevði lættliga kostað 800 ella 1100. Pass er gott! Tá EV koma í 6hj, kann eisini vera freistandi hjá Norðan at dupla — ein útspælsvegleiðandi dupling, sum í hesum førinum hevði biðið makkaran spælt kleyvara út. Men tíbetur tagdi Hans Jacob. Ein dupling hevði givið EV møguleikan at flutt í 6ut, sum ikki kann setast.

Kontraktin varð sett. Arnbjørn tók ru A í útspælinum og spældi síðan kleyvara, sum makkarin trumfaði. Í hinum rúminum meldaðu Bogi og Rói 4hj, eftir at Norðan hevði sperra í kleyvara, og fingu 12 stikk. 13 imp inn.

# Bridge-undirvísing fyri ungdóm



*Hóast tað eru nógv, sum hvønn vetur fáast við bridge-spælið, so sóknast Bridge-Sambandið eftir fleiri ungum leikarum, sum kunnu taka yvir komandi árini*

**Bridge sambandið fer nú undir undirvísing fyri framhaldsdeildunum í trimum av stóru skúlunum í Tórshavn**

BRIDGE
*Tíðindaskriv frá FBS*

Føroya Bridge Samband fer í ár at undirvísa í bridge í trimum skúlum í Tórshavn, nevniliga Kommunuskúlanum, Eysturskúlanum og Føroya Studentaskúla og HF-Skeiði.

Mentamálastýrið stuðlar fíggjarliga, soleiðis at undirvísing og undirvísingartilfar verður ókeypis. Skúlarnir leggja høli til og hjálpa við upplýsing um tiltakið. Føroya Bridge Samband útvegar lærarar og undirvísingartilfar. Undirvísingartiltakið í ár er ein roynd, og verður tað væleydnað, verður hildið fram á skúlum kring landið komandi ár.

Royndir frá Kvøld- og Ungdómsskúlanum (her fer Arnbjørn Sivertsen at undirvísa í vetur) vísa, at undirvísingin hildnast best, tá næmingarnir byrja um 14 ára aldur. Málbólkurin er tí fyrst og fremst næmingar á framhalds- ella studenta og HF-skúlum. Tað eru tó bæði yngri næmingar og lærarar á skúlanum, sum ynskja at luttaka, og tey eru eisini hjartaliga vælkomin, einasta treytin er, at viðkomandi hava hug at spæla kort. Hevur ein ikki roynt hetta áður so ein ivast, ber til at meta seg eftir, um einum dámar at loysa uppgávur: eitt bridgespæl er ein meldiuppgáva og ein spæliuppgáva, og kappingin snýr seg um at loysa uppgávuna til hvørt spælið best møguligt.

Undirvísingin er skipað soleiðis:

Á Kommunuskúlanum í Havn fer Fríðhild Petersen at hava ábyrgdina.

Á Føroya Studentaskúli og HF-Skeið verður tað Kaj Alstrup.

Á Eysturskúlan verður tað Heðin Mouritsen.

## Ov fá ung

Hesir tríggir bridgelærararnir — sum allir eru bridgespælarar við undirvísingarroyndum — fáa síðani hjálparfólk fyri t.d. at tryggja móti forfalli og í heila tikið at gera undirvísingina meira áhugaverda.

Seinri í heyst og helst eisini til várs er ætlanin at gera útferðir við næmingunum soleiðis, at hesir kunnu møta øðrum næmingum, bæði í bridgekapping og í øðrum høpi.Ætlanin var í vár at savna allar næmingar til eitt ”treff” í Vági, men hetta datt niðurfyri av ymiskum orsøkum, m.a. EM í Italia. Tað hevði tí verið hóskandi í staðin at skipa fyri einum vikuskiftistiltaki í Vági til heystar. Hvar farið verður til várs kann støða verða tikin til, tá vit vita meira um, hvar undirvíst verður aðrastaðir og hvat næmingarnir sjálvir vilja.Lagt skal verða afturat, at eisini her stuðlar Mentamálastýrið fíggjarliga (av veddingarpeninginum).

Í Føroyum eru nógv fólk, sum spæla bridge, og í summar vístu vit, at vit ikki smæða okkum burtur í altjóða høpi, tí bæði manslíðið og kvinnuliðið vunnu á heilt sterkum tjóðum. Eisini unglingalandsliðini hava havt góð úrslit í norðurlendskum kappingum, sjálvt um Norðurlond teljast millum sterkastu bridgetjóðirnar.

Í mun til í grannalondum okkara eru alt ov fá ung í Føroyum, sum spæla bridge. Hetta er stórt spell, tí bridge gevur so nógv afturat av upplivingum, vinskapi og spenningi. Harafturat er so nógv lættari at fáa gott samband við fólk, líkamikið hvar ein er í heiminum, tí bridge verður spælt kring allan knøttin — ikki minst millum lesandi (í Danmark er t.d. DM fyri skúlanæmingar).

Annaðhvørt ár (tey ólíka) verður skipað fyri NM í bridge fyri unglingar (upp til 25 ár) í ymsu Norðurlondunum. Kappingin verður í Føroyum 2007. Nú eru okkara unglingar í eldra lagi, og FBS ynskir at hava eitt so sterkt unglingalið sum gjørligt til ta tíð. Harafturat verða eingi evni til landsliðið, um ikki byrjað verður á ungum aldri, so møguleikarnir at luttaka í landsliðshøpi eru sera góðir, verður byrjað nú.

Ein kann tekna seg til undirvísingina á skúlanum, men øll eru eisini vælkomin at seta spurningar ella boða frá luttøku beinleiðis til FBS: bridge@bridge.fo. Sí eisini heimasíðuna hjá Føroya Bridgesambandi: www.bridge.fo



# Byrja við grannauppgerðum

**Fyrsti dysturin í hondbóltsárinum verður leiktur í Hoyvíkshøllini, har bæði H71 og KÍF hava heimavøll, og grannauppgerðin millum Neistan og Kyndil verður eisini í fyrsta umfarinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Komandi vikuskifti verður aftur lagt til brots í hondbóltslandskappingini. Ein kapping, sum í mun til fleiri aðrar ferðir byrjar, áðrenn fótbólturin endar. Hetta einamest orsakað av landsdystunum, sum verða á skránni komandi vár, og sum í stóran mun fara at leggja hondbóltslandskappingina stilla í nakrar vikur.

**Tvær grannauppgerðir**

Og tað er ikki eiti á byrjan, sum hondbóltsárið fær. Longu í fyrsta umfarinum verða heilar tríggjar grannauppgerðir í Havn, tá Neistin og Kyndil fara at takast hjá bæði kvinnum og monnum, eins og H71 og KÍF spæla fyrsta almenna dystin í nýggju Hoyvíkshøllini, har bæði liðini nú mugu sigast at hoyra til.

Føroyameistararnir úr VÍF skulu bæði hjá kvinnum og monnum royna seg ímóti Tjaldri, og endaliga verður dystur í Vági millum kvinnuliðini hjá VB og Stjørnuni, sum bæði tykjast vera langt frá styrkini, sum tey hava átt seinastu tvey-trý kappingarárini.

*Longu í fyrsta umfarinum verður grannauppgerð í Havn, tá bæði kvinnur og menn hjá Neistanum og Kyndli hittast*



**Skráin fyri fyrstu umførini av kappingini er annars hendan.**

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 29.09 | 14.30 | Neistin-Kyndil |
| 29.09 | 15.00 | VB-Stjørnan |
| 29.09 | 14.30 | VÍF-Tjaldur |
| 06.10 | 14.30 | Kyndil-StÍF |
| 06.10 | 15.00 | Stjørnan-Neistin |
| 06.10 | 15.00 | VB-Tjaldur |
| 13.10 | 15.00 | Stjørnan-Kyndil |
| 13.10 | 14.30 | Tjaldur-StÍF |
| 13.10 | 14.30 | VÍF-Neistin |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 28.09 | 16.00 | H71-KÍF |
| 29.09 | 16.00 | Neistin-Kyndil |
| 29.09 | 16.00 | VÍF-Tjaldur |
| 05.10 | 16.00 | H71-Tjaldur |
| 06.10 | 16.00 | Kyndil-StÍF |
| 06.10 | 16.00 | KÍF-Neistin |
| 09.10 | 16.00 | H71-VÍF |
| 09.10 | 16.00 | StÍF-KÍF |
| 13.10 | 16.00 | Tjaldur-StÍF |
| 13.10 | 16.00 | VÍF-Neistin |
| 16.10 | 16.00 | Neistin-Tjaldur |
| 16.10 | 16.00 | KÍF-Kyndil |

# Barnasúkkling

Úrslit av Føroyameistaraskapi í einkultstarti hjá børnum.

Súkkling
Tíðindaskriv

Føroyameistarakappingin í einkultstarti fór fram í Havn. Teinurin, ið súkklast skuldi gekk frá Føroya Sparikassi Yvir við Strond til tyrlupallin og aftur. Dreingir 12-14 ár súkklaðu teinin tvær ferðir, meðan hini súkklaðu teinin eina ferð. Teinurin frá Sparikassanum til tyrlupallin og aftur er uml. 3 km.

Enn einaferð upplivdu føroysku súkklararnir gott veður, og sera hugaligt var tí hjá børnunum at súkkla hóskvøldið.

Fýra meistarar

Fitt av børnum stillaðu til FM-kappingina, har fýra føroyameistarar blivu funnir.

Mest spennandi kappingin var hjá dreingjum 12 til 14 ár. Hesir skuldu koyra teinin tvær ferðir, og áskoðararnir fingu tí at vita hvussu ”landið lá” áðrenn hesir skuldu út á seinna umfarið. Tað var rættiliga tætt ímillum teir tríggjar, Rúna, Rana og Torkil, og tá teir vendu lá Rúni 14 sekundir framman fyri Rana, sum eisini bert førdi við nøkrum fáum sekundum framman fyri Torkil Weyhe. Enn var ov tíðliga at siga hvør fór við sigrinum, men Rúni megnaði at halda tørn og vinna kappingina.

Kappingin millum júst hesar tríggjar hevur verið jøvn í ár. Teir hava havt mangan harðan dystin, og meðan Rani fór við sigrinum í Býarkoyring fyri viku síðan, ja so átti Rúni tørn nú, og kann nú eisini kalla seg føroyameistara.

Ein orsøk til framgongdina hjá Rúna er sjálvandi fyrst og fremst at hann hevur vant dúgliga, men hóskvøldið royndi hann eisini á fyrsta sinni at koyra kapp á einari rættiligari kappsúkklu (eins og Torkil og Rani hava). Hetta gav úrslit, og Rúni vann FM-kappingina við 11 sekundum.

Heiðursmerkir vóru sjálvandi til tríggjar teir fremstu og steyp var eisini til vinnaran í hvørjum bólki. Tórshavnar Súkklu Felag takkar stuðlinum í ár, Føroya Bjór, fyri góða stuðulin gjøgnum alt kappingarárið.

Súkkluárið hjá børnum er liðugt fyri í ár. Barnasúkkluvenjingin byrjar aftur á vári 2003.



*Ragnar Kruse, sum var yngsti súkklarin í kappingini, hevði pápan við, soleiðis at trygdin var, sum hon eigur at vera*

**Dreingir 8 ár og yngri:**

| Nr. | Navn | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Jógvan Mellemgaard | 8.46 |
| 2 | Ragnar Kruse | 13.41. |
| 3 | Jákup Ólavson | 16.12 |

**Dreingir 9 til 11 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Reidar Luid | 7.21 |
| 2 | Finnur Mellemgaard | 7.30 |
| 3 | Niels Christiansen | 7.49 |
| 4 | Christoffur Nielsen | 7.52. |
| 5 | Sigmund Olsson | 7.59 |
| 6 | Atli Carlson | 8.09 |
| 7 | Jógvan Ólason | 8.14 |
| 8 | Kári Joensen | 8.16 |

**Dreingir 12 til 14 ár**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Rúni Bláfoss | 13.49 |
| 2 | Rani G. Jakobsen | 14.00 |
| 3 | Torkil Weyhe | 14.30 |

**Gentur 9 til 11 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Durita F. Augustinussen | 10.01 |
| 2 | Rakul Á Jakobsen | 10.16 |
| 3 | Sólja Christiansen | 10.37 |
| 4 | Fjóla Luid | 11.17 |

NSÍ-B36 1-1 (1-0):

# Hvørgin slapp

**B36 misti eitt fet í silvurdystinum, og NSÍ livir enn í vandanum fyri beinleiðis niðurflyting, eftir at liðini býttu stigini sínamillum leygardagin**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Stantum verður ofta tikið til, tá talan er um javnleik í sjavs, og tað man eisini vera ein hóskandi orðing, tá takast skal samanum dystin millum NSÍ og B36 í aðru deild hjá monnum.

Tað var nevnliga so at hjá báðum pørtum ráddi um at fáa trý stig. Hjá B36 var tað dysturin um silvurið, sum taldi mest, meðan tað hjá NSÍ ráddi um at fáa ein sigur, soleiðis at tað endaliga kundi staðfestast, at liðið eisini er í næst bestu deildini komandi kappingarár.

Hetta eydnaðist tó hjá hvørjum av pørtunum, og saman við úrslitunum í hinum dystunum í deildini, viðførdi hetta, at støðan hjá báðum liðunum versnaði. B36 datt aftur á triðja plássið, og skulu nú vinna seinasta dystin á LÍF, um teir skulu hava heiðursmerki, og hjá NSÍ er tað nú avgerandi, at teir fáa stig í Sumba, um teir ikki skulu spæla um upp- og niðurflyting, ella í ringasta føri flyta beinleiðis niður. Hetta um NSÍ tapir sín dyst í Sumba, samstundis sum HB á seinasta leikdegi vinnur á KÍ í Klaksvík.

**Dysturin í tølum**
**NSÍ-B36 1-1 (1-0)**
1-0: Andy Olsen
1-1: Jón Brekku